


## NÝGGJ HØGRA, MIÐ-HØGRA OG VINSTRA SAMGONGA SKIPAÐ



*Mynd 1. Ríkisráðsfundur. Nýggja ríkisstjórnin á fundi á Bessastøðum í sambandi við, at hon formliga tók við 30. november.*

Úrslitið eftir valið 28. oktober gav onga ábending um, hvørja samgongu íslendingar ynsktu. 8 flokkar vórðu valdir í Altingið. Hetta er fyrstu ferð, at so nógvir flokkar eru umboðaðir í Altinginum. Av hesum vóru tveir nýggir. Samgongan varð formliga skipað 30. november, t.v.s. at tað tók 32 dagar at finna fram til eina samgongu. Seinast (eftir valið 29. oktober 2016) tók tað 73 dagar.

Fyrsta royndin at skipa samgongu eftir valinum hesaferð varð gjørd, tá ið Katrín Jakobsdóttir, forkvinna í Vinstra grønum fekk litið upp í hendurnar frá forseta Íslands at skipa eina stjórn. Samgongusamráðingarnar fóru fram millum Vinstra grønar (11 altingslimir), Framsóknarflokkin (8), , Samfylkingina (7) og Píratarnir (6), sum hava 32 altingslimir av teimum 63 altingslimunum, ið eru í Altinginum. Henda royndin miseydnaðist og Katrín Jakobsdóttir mátti boða forsetanum frá, at tað eydnaðist ikki at skipa samgongu millum hesar flokkar.

> *»Forseti Íslands gav hereftir ikki nøkrum floksformanni heimild at skipa stjórn, men heitti í staðin fyri á floksformennirnar um, at tosa saman og røða um møguleikar fyri, at finna fram til møguleikar at skipa stjórn.«*

Hví so varð gjørt, kann møguliga vera tí, at tað var eitt sindur ivingarsamt um Bjarni Benediksson, formaður í Sjálfstæðisflokkinum ella Katrín Jakobsdóttir, forkvinna í Vinstru grønum skuldi gerast forsætisráðharri í einar møguligari komandi stjórn, um so varð, at hesir báðir flokkarnir skuldu tikið upp samstarv. Tí kundi tað møguliga órógva komandi samráðingar, um forsetin gav einum av teimum báðum formonnunum fullmakt at skipa eina stjórn.



*Mynd 2. Bjarni Benediktsson (v.m.), floksformaður fyri Sjálfstæðisflokkin, Katrín Jakobsdóttir, floksforkvinna fyri Vinstra grønu (m.f.) og Sigurður Ingi Jóhannsson (h.m), floksformaður fyri Framsóknarflokkin.*

Sjáfstæðisflokkurin (16), Vinstra grønir (11) og Framsóknarflokkurin (8) tóku síðani upp samband og umrøddu møguleikarnar fyri, at skipa samgongu. Eftir drúgva umrøðu, gjørdu flokkarnir av, at royna at skipa samgongu. Full undirtøka var fyri hesum í Sjálfstæðisflokkinum og Framsóknarflokkinum, men tveir av ellivu altingslimum í Vinstra grønum tóku ikki undir við, at flokkurin skuldi fara í samgongusamráðingar við Sjálfstæðisflokkin. Meðan flokkarnir samráddust, var stórt trýst á Vinstra grøna flokkin, tí eini 200 limir meldaðu seg úr flokkinum, tí teir vóru ónøgdir við, at flokkurin samráddist við Sjálfstæðisflokkin um

samgongusamstarv. Samstundis meldaðu 70 seg inn í flokkin. Hóast hetta, so fóru teir tríggir flokkarnir undir samgongusamráðingar og uml. 3 vikur seinni vóru flokkarnir komnir á mál við einum samgonguskjali, sum floksleiðslurnar skuldu góðkenna. Sama støða gjørdi seg aftur galdandi her. Full undirtøka frá teimum báðum borgarligu flokkunum, meðan eini 20% av floksleiðsluni í Vinstra grønum tóku ikki undir við samgonguskjalinum, harundir fyrrnevndu báðir altingslimirnir. Við tað, at meiriluti kortini var í flokkinum, so varð farið í samgongusamstarv við Sjálfstæðisflokkin og Framsóknarflokkin. Katrín Jakobsdóttir, forkvinna í Vinstra grønum hevði telvað støðuna soleiðis, at hon og flokkur hennara skuldu fáa forsætisráðharran og tveir ráðharrar afturat, umframt altingsformannin, Sjálfstæðisflokkurin skuldi fáa 5 ráðharrar og Framsóknarflokkurin skuldi fáa 3 ráðharrasessir.

30. november var ríkisfundur hjá forsetanum á Bessastøðum, har nýggja stjórnin tók við. 1. desember – á 99 ára fullveldisdegnum hjá Íslandi – tóku nýggju ráðharrarnir yvir teirra ráðharraskrivstovur.

## STUTT UM SAMGONGUSKJALIÐ (BROT)




*Mynd 3. Nýggja samgonguskjalið hjá íslendsku stjórnini.*

Flokkarnir tríggir tóku sær góða tíð til at umrøða og at smíða samgonguskjalið. Tað tók tað mesta av trimum vikum, at fáa gjørt samgonguskjalið liðugt. Samgonguskjalið er út við 40 síður. Seinasta samgonguskjal var til samanberingar bert 10 síður. Hetta er gjørt fyri at tryggja, at komið er runt um allar týðandi samfelagstættir, sum hava politiskan áhuga og at lýsa viðurskiftini, tí flokkarnir spenna vítt á vinstra-høgra politiska ásinum. Talan er um fleiri enn 100 átøk, sum nevnd eru í samgonguskjalinum.

**Inngangur:**

Nýggja stjórnin ætlar at fáa ein nýggjan tóna, savna orkuna til týðandi verkætlanir, sum skulu fáa Ísland í fremstu røð og taka stig til, at gera Ísland til eitt gott stað at búgva í hjá bæði ungum og eldri.

Støðan í Íslandi viðvíkjandi almannamál, er í nógvum førum óvanlig. Sjálvt um javnvág er rokkin í almenna búskapinum, eru tað framvegis avbjóðingar, sum hava skund at verða loystar í grundleggjandi bygnaðinum í samfelagnum. Tá tað snýr seg um landsmiðal, er fíggjarliga støðan hjá fólkunum broytt skjótt seinnu árini, men tað er umráðandi at varðveita javnvág og tryggja, at øll sum búgva í hesum landi hava eins møguleikar.

Vit skulu miða eftir langtíðar støðufesti við størri gjøgnumskygni í búskapinum og hjá øllum almennum myndugleikum og soleiðis byggja upp álitið hjá almenninginum til háttin, fyritøkur verða riknar, fíggjarliga økið, politikkur og sosialir stovnar. Viðgongd er rokkin á nógvum økjum síðan fíggjarliga skrædlið, men sosiala semjan, sum tjóðin leingi hevur ynskt, er enn ikki førd út í lívið. Vit skulu arbeiða fram ímóti hesum. Samstundis skulu vit reagera uppá skjótar broytingar og nýggjar sosialar støður á nógvum økjum og eisini alheims ójavna og ófrið.

Ísland kann fáa sína rødd hoyrda á altjóða pallinum við at vera fyrimynd fyri javnrættindi millum menn og kvinnur (har sum pláss framvegis er fyri batum), við at seta sær framsøkin mál, fyri at vinna á veðurlagsbroytingum, við at verja óspilta útsýnið og við at røkja tað náttúruliga umhvørvið og djóralívið. Burðardygg menning skal vera vegleiðandi meginregla, tá vit taka avgerðir í samsvari við okkara altjóða skyldur og málini, vit hava bundið okkum til at virða.

Víðkað hoyring og meira virkið samskifti eigur at verða aftanfyri allar ætlanir, sum skulu setast í verk við framtíðini í huga. Samstarvið millum flokkarnar í Altinginum má økjast, sjálvt Altingið má gerast meira óbundið og tess starvsskipan, fakligi stuðul og støða skal hækka. Djúpari ráðlegging skal fáast við arbeiðsmarknaðin, fyri at røkka einum sterkari samfelagi á so nógvum økjum, sum gjørligt. At enda skal ráðlegging við kommunurnar og hjálp til kommunurnar til at styrkja undirstøðukervið, økismenningina og fíggjarligu viðurskiftini styrkjast.
Óvanligar umstøður krevja broyting í tilgongdini, við alt opnari fyrisiting, gjøgnumskygni og virðing fyri teimum verkætlanum, vit arbeiða við. Tað er eitt ynski um, at flokkarnir nú fara í holt við samstarv við samgonguna og styrkja starvsemina hjá Altinginum á ein nýggjan hátt, við støði í áhugamálinum hjá fólkinum í hesum landi og ikki minst við at taka væl umhugsaðar atgerðir, fyri at styrkja Altingið og økja um tess ávirkan.

**Uttanríkispolitikkur**

*Evropa og handilsviðurskifti*. Norðurlendska samstarvið verður framhaldandi ein av hornasteinunum í íslendskum uttanríkispolitikki. Áhugamálini hjá Íslandi hava tað best við at verða verandi uttanfyri ES. Stjórnin heldur at ein av teimum sera týdningarmiklu áhugamálunum fyri Ísland, er verkseting av EBS avtaluni. Tað er sera týdningarmikið, at størsta varsemi verður víst, fyri at tryggja áhugamálini hjá Íslandi í sambandi við at Stórabretland fer úr ES. Bretland er ein av størstu handilspartnarum Íslands. Fríur og opin altjóða handil er fyrimunur fyri smærri opnum búskapum og fremur teirra menning. Áherðsla verður løgd á at gera fleiri fríhandilsavtalur, bæði tvílanda og aðrar í samráð við EFTA londini, og at taka av handilsforðingar. Tá slíkar avtalur verða gjørdar, skal tað serliga leggjast áherðsla á at fremja umhvørvismál og menniskjarættindi, harundir rættin hjá kvinnum.
*Arktisk og veðurlagsviðurskifti*. Ísland hevur eina serliga støðu sum arktiskt land, síðan ein stórur partur av búskaparliga økinum liggur í Arktis. Økt skipaferðsla og annað virksemi í økinum gevur bæði møguleikar og avbjóðingar, tá tað ræður um umhvørvið, lívhválvina og vanliga lívsháttin. Tann serliga og viðbrekna vistfrøðiskipanin eigur altíð at fáa gagn av ivanum. Ísland hevur formansskapin fyri Arktiska Ráðið í 2019 – 2021. Arktisk viðurskifti eru viðkomandi í so at siga øllum viðurskiftum í íslendska samfelagnum og fær hægstu raðfesting í uttanríkispolitikkinum. Í Artiska Ráðnum vil Ísland leggja áherðslu á alheimsmálini hjá ST, veðurlagsviðurskifti og mál viðvíkjandi havinum. Í samsvari við góðkenda íslendska politikkin um Arktis, vil Ísland leggja dent á virðing fyri rættindum hjá uppruna fólkunum og javnstøðu millum kynini.
*Trygd og menning*. Stjórnin sær tað sum eina raðfesting at hava landsins trygdarmál í einari góðari støðu. Landsins trygdarpolitikkur, sum er góðkendur av Altinginum, verður fylgdur sum vegleiðing á hesum øki. Brúk av hesum politikki skal fara fram í tættari ráðførslu við Altingið til eina og hvørja tíð. Íslendski uttanríkispolitikkurin er grundaður á greiðar meginreglur fyri fólkaræði, menniskjarættindum, javnstøðu millum kynini, burðardyggari menning og friðarligum loysnum av ósemjum. Stjórnin hevur ætlanir um at økja um játtanina til menningarstuðul tey komandi árini, til hon er vorðin 0,35% av BTÚ um fimm ár. Luttøkan hjá Íslandi í menningarætlanum, fer fram frá almennum stovnum.

**Heilsumál**
Íslendska heilsuskipanin skal kunna máta seg við heimsins bestu. Øll í Íslandi skulu hava atgongd til dygdartænastur, óansæð fíggjarliga støðu ella hvar í landinum tey búgva. Læknamiðstøðirnar skulu styrkjast. Bygging av nýggjari viðgerðarmiðstøð í Landspítalanum byrjar komandi summar. Nýhugsan í heilsurøktini fær eyka stuðul, so Ísland kemur í fremstu røð og tekur í nýtslu nýggjastu tøkni á hesum øki, t.d. televiðgerðir. Ein mental heilsuætlan fram til 2020 verður fíggjað og sett í verk. Stjórnin vil serliga raðfesta fyribyrgjandi tiltøk og heilsu fyri øll. Hetta vil fevna um tiltøk í útbúgvingarskipanini, heilsuskipanini og stuðul til ítrótt, ítriv millum ungfólk og arbeiði millum eldri fólk.
Vantandi pláss á røktarheimum hevur økt um trýstið á sjúkrahúsunum og minkað um lívsdygdina hjá teimum eldru. Ein herferð á hesum øki verður sett í verk.

**Útbúgving og gransking**
Stjórnin ætlar at leggja serliga áherðslu á útbúgving innan list og eyka tekniskar førleikar, fyri at gera íslendska samfelagið meira kappingarført. Meiri stuðul verður veittur til handverk og ídnaðarliga vinnu og til praktiskar vinnuligar útbúgvingar, fyri at stuðla undir einum fjøltáttaðum og sterkum samfelagi, grundað á breiðari viftu av førleikum.
Eitt av høvuðsmálunum hjá stjórnini er at tryggja eins atgongd til útbúgving óansæð, hvar fólk búgva og teirra umstøður annars. Lógarverkið fyri miðnámsskúlar og hægri útbúgvingar skal endurskoðast, og greiðir karmar fyri útbúgvingarvirksemi og útbúgvingarstovnarnar, eins og samstarvið við vinnulívið skulu setast í verk.
Málið er, at Ísland skal røkka OECD miðaltalinum viðvíkjandi fígging av universitetsútbúgvingum í 2020 og norðurlendska miðaltalinum í 2025. Fígging verður veitt ætlan fyri máltøkni, sum skal tryggja, at íslendskt verður nýtiligt í teldurúmdini.
Útbúgvingarlánsskipanin verður endurskoðað í samstarvi við tey lesandi, við atliti at eins rættindum til útbúgving, virkisføri og einari stuðulsskipan, sum er grundað á norðurlendska modellið.

**Fiskivinna**
Íslendska fiskivinnan hevur eina góða støðu í altjóða høpi orsakað av, at dentur er lagdur á burðardygga veiðu, gransking og menning. Kappingarstøðan á altjóða marknaðum skal tryggjast og haldast skal fram við nýhugsan og vørumenning, fyri at økja um virðið av vørunum. Harumframt skulu skipanir setast í verk, sum skulu gera fiskaríið $CO_2$ neutralt við øktari gransking av varandi orkukeldum til fiskiflotan.
Fiskivinnugransking hevur ein týðandi leiklut í burðardyggari gagnnýting av tilfeinginum í havinum, og hon skal víðkast. Tá lóggávan um fiskivinnugjøld verður endurskoðað, skal høvuðsendamálið verða, at tryggja tjóðini ein rímiligan part av yvirskotinum frá tilfeingisnýtsluni, og gjaldið skal grundast á vinningin hjá fiskivinnufyritøkunum. Tilfeingisgjaldið skal vera gjald fyri at hava atgongd til eitt avmarkað tilfeingi og gjald av partinum av avlopinum, fyri at gera nýtslu av tí.
Aling er ein vaksandi vinna og veitir møguleikar fyri fleiri størvum, men skal mennast við stórum varsemi og í samsvari við vísindaligu ráðgevingina, so biologiska margfeldið ikki kemur í vanda. So hvørt vinnan veksur, mugu neyðugar

kanningar og eftirlit av ávirkanini á tí livandi umhvørvinum gerast. Framtíðar skipan viðvíkjandi loyvisgjaldi eigur eisini at verða umrødd.

**Annað, sum samgonguskjalið eisini umrøður:**

- Tað verða settir tvørpolitiskir bólkar á nøkrum týðandi økjum, so sum stovnsetan av miðaldar tjóðgarði, orðing av orkupolitikki og nýhugsunarpolitikki og endurskoðan av stjórnarskipanini.
- Seta á stovn ein tjóðargrunn við fæi frá landsins ognum. Grunnurin skal kunna standa ímóti búskaparligum skelkum.
- Hækking av mvg í sambandi við ferðavinnu verður slept. Kapitalinntøkuskatturin verður hækkaður til 22%. Kolvetnisgjøldini verða hækkað við 50%. Mvg á bókum verður strikað.
- Stjórnin leggur áherðslu á ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk og búskaparligt støðufesti. Inntøkuskatturin í lægra inntøkustiganum lækkar.
- Verkseting av ljóstrevjatøkni runt alt Ísland verður liðugt í 2020.

*Sí meira her (samgonguskjalið á íslendskum) og her (samgonguskjalið á enskum)*

## NÝGGJA STJÓRNIN

Í nýggju stjórnini eru 11 ráðharrar. Í undanfarnu stjórnini vóru eisini 11 ráðharrar. 5 av teimum halda fram í nýggju stjórnini. Av hinum 6, sum eru nýggir í hesari samgonguni, hava 2 ikki verið ráðharrar áður.

Sjálfstæðisflokkurin fær 5 ráðharrar, Vinstra grønir fáa forsætisráðharran og tveir ráðharrar og Framsóknarflokkurin fær 3 ráðharrar.

## STUTT UM NÝGGJU RÁÐHARRARNAR

**Katrín Jakobsdóttir – Vinstra grønir – forsætisráðharri**

Katrín hevur verið limur í Altinginum síðan 2007, tá hon varð vald inn fyri Vinstra grønu í Reykjavíkar norður valdømi . Katrín hevur verið Menta- og menningarmálaráðharri og norðurlendskur samstarvsráðharri frá 2009–2013. Í 2013 gjørdist Katrín formaður í Vinstra grøna flokkinum.



*Mynd 4. Katrín Jakobsdóttir, 41 ár, er nýggjur forsætisráðharri.*

Hon er fødd 1. februar 1976. Katrín hevur BA-prógv í íslendskum og fronskum sum hjágrein frá Háskóla íslands í 1999, Masterprógv í íslendskum bókmentum í 2004.

Katrín er næsti kvinnuligu forsætisráðharrin í Íslandi.

*Sí meira um Katrín Jakobsdóttur her (á íslendskum)*

***Bjarni Benediktsson – Sjálfstæðisflokkurin – fíggjarmálaráðharri***

Bjarni hevur verið limur í Altinginum síðan 2003, tá hann varð valdur inn fyri Sjálfstæðisflokkin í Suðurvestur valdøminum. Hann hevur verið fíggjar- og búskaparráðharri í undanfarnu samgongu frá 2013–2016. Í januar 2017 til nú, hevur Bjarni verið forsætisráðharri.



*Mynd 5. Bjarni Benediktsson, 47 ár, tekur aftur við sum fíggjarmálaráðharri, eftir at hava verið forsætisráðharri.*

Hann varð føddur tann 26. januar í 1970 í Reykjavík. Hann fekk bachelorprógv í løgfrøði frá Háskólanum í Reykjavík í 1995, las týskt og løgfrøði í Týsklandi frá

1995-1996, tók masterprógv í løgfrøði í Miami í 1997, og ríkisgóðkendur virðisbræva seljari í 1998. Hann hevur verið formaður í Sjálfstæðisflokkinum síðan 2009.

*Sí meira um Bjarna Benediktsson her (á íslendskum)*



*Mynd 6. Sigurður Ingi Jóhannsson, 55 ár, er nýggjur ferðslu- og kommunumálaráðharri og norðurlendskur samstarvsráðharri.*

**Sigurður Ingi Jóhannsson – Framsóknarflokkurin – ferðslu- og kommunumálaráðharri og norðurlendskur samstarvsráðharri**
Sigurður Ingi hevur verið limur í Altinginum síðan 2009, tá hann varð valdur inn fyri Framsóknarflokkin í suðurvaldøminum. Hann hevur verið fiski- og landbúnaðarmálaráðharri frá 2013–2016 og forsætisráðharri frá 2016–2017.

Hann varð føddur 20. apríl 1962. Sigurður Ingi er útbúgvin djóralækni frá kongaliga djóralækna- og landbúnaðarháskúlanum í Keypmannahavn (KVL).

*Sí meira um Sigurð Inga her (á íslendskum)*



*Mynd 7. Guðlaugur Þór Þórðarson, 49 ár, heldur fram sum uttanríkisráðharri.*

***Guðlaugur Þór Þórðarson – Sjálfstæðisflokkurin – uttanríkisráðharri***
Hevur verið altingslimur 2003–2017. Heilsu- og almannamálaráðharri 2007–2008 og heilsumálaráðharri 2008–2009. Hevur verið formaður í tingbólkinum hjá Sjálfstæðisflokkinum síðan 2016. Í 2017 gjørdist Guðlaugur Þór uttanríkisráðharri.

Føddur 19. desember 1967. Bachelorprógv í stjórnmálafrøði frá Háskóla Íslands í 1996.

*Sí meira um Guðlaug Þór Þórðarson her (á íslendskum)*

***Kristján Þór Júlíusson – Sjálfstæðisflokkurin – fiski- og landbúnaðarmálaráðharri***



*Mynd 8. Kristján Þór Júlíusson, 60 ár, er nýggjur fiski-og landbúnaðarmála-ráðharri*

Hevur verið altingslimur síðan 2007. Heilsumálaráðharri 2013–2017. Menta- og menningarmálaráðharri 2017.

Føddur 15. júlí 1957. Skipsførari frá Stýrimannaskólanum í Reykjavík 1978. Nám í íslendskum og almennum bókmentum frá Háskóla Íslands 1981–1994. Læraraprógv frá Háskóla Íslands í 1984.

*Sí meira um Kristján Þór Júlíusson her (á íslendskum)*



*Mynd 9. Þórdís Kolbrún R. Gylfadóttir, 30 ár, heldur fram sum ídnaðar-, nýskapanar- og ferðavinnumála-ráðharri*

***Þórdís Kolbrún R. Gylfadóttir – Sjálfstæðisflokkurin – ídnaðar-, nýskapanar- og ferðavinnumálaráðharri***
Altingslimur síðan 2016. Ídnaðar-, nýskapanar- og ferðavinnumálaráðharri síðan 2017.

Fødd 4. november 1987. BA prógv í løgfrøði frá Háskólanum í Reykjavík í 2010 og ML prógv í løgfrøði frá Háskólanum í Reykjavík í 2012.

*Sí meira um Þórdís Kolbrún R. Gylfadóttur her (á íslendskum)*



*Mynd 10. Sigríður Á. Andersen, 46 ár, heldur fram sum løgmálaráðharri*

***Sigríður Á. Andersen – Sjálfstæðisflokkurin - løgmálaráðharri***

Altingslimur síðan 2015. Løgmálaráðharri síðan 2017.

Fødd 21. november 1971. Løgfrøðiprógv frá Háskóla Íslands í 1999.

*Sí meira um Sigríður Á. Andersen her (á íslendskum)*



*Mynd 11. Svandís Svavarsdóttir, 53 ár, er nýggjur heilsumálaráðharri*

**Svandís Svavarsdóttir – Vinstra grønir - heilsumálaráðharri**

Hevur verið altingslimur síðan 2009. Var umhvørvismálaráðharri frá 2009–2013. Formaður tingflokksins 2013–2017.

Fødd 24. august 1964. BA prógv í almennum málvísindum og íslendskum frá Háskóla Íslands 1989. Hevur lisið framhaldslestur í íslendskari málfrøði í Háskóla Íslands 1989–1993.

Sí meira um Svandís Svavarsdóttur her (á íslendskum)



*Mynd 12. Guðmundur Ingi Guðbrandsson, 40 ár, er nýggjur umhvørvis- og tilfeingismálaráð harri*

**Guðmundur Ingi Guðbrandsson – Vinstra grønir – umhvørvis- og tilfeingismálaráðharri**

Guðmundur Ingi er sonevndur uttantingsráðharri, t.v.s. at hann varð ikki valdur í Altingið, sum einasti av ráðharrunum. Undan ráðharratilnevningini, starvaðist Guðmundur Ingi sum stjóri í Landvernd (íslendska umhvørvisstovan) frá 2011 til 2017.

Føddur 28. mars 1977. BSc. Prógv í lívfrøði frá Háskóla Íslands og masterprógv í umhvørvisfrøði frá Yale University.

*Sí meira um Guðmund Inga her (á íslendskum)*



*Mynd 13. Lilja Alfreðsdóttir, 44 ár, er nýggjur menta- og menningarmálaráðharri*

**Lilja Alfreðsdóttir – Framsóknarflokkurin – Menta- og menningarmálaráðharri**

Altingslimur síðan 2016. Uttanríkisráðharri 2016–2017.

Fødd 4. oktober 1973. BA prógv í stjórnmálafrøði frá Háskóla Íslands. Masterprógv í altjóða búskaparfrøði frá Columbia University, New York, 2001.

*Sí meira um Lilju Alfreðsdóttur her (á íslendskum)*



*Mynd 14. Ásmundur Einar Daðason, 35 ár, er nýggjur almanna- og javnstøðumálaráðharri*

**Ásmundur Einar Daðason – Framsóknarflokkurin – Almanna- og javnstøðumálaráðharri**

Altingslimur 2009–2016 og síðan 2017. Formaður fyri tingflokkin 2015–2016.

Føddur 29. oktober 1982. Búnaðarfrøðingur frá Landbúnaðarháskúlanum á Hvanneyri 2002. B.Sc. prógv í almennum búnaðarvísindum frá Landbúnaðarháskóla íslands 2007.

*Sí meira um Ásmund Einar Daðason her (á íslendskum)*

## *STUTT UM SAMGONGUFLOKKARNAR*

**Vinstrihreyfingin – Grænt framboð:** Flokkurin liggur út til vinstru og varð stovnaður í 2000 av fólki, ið vóru ónøgd við skránna hjá Samfylkingini. Hann er friðarsinnaður, javnaðarsinnaður og feministiskur. Flokkurin er ímóti ES limaskapi. Sum navnið vísir, er flokkurin eisini umhvørvissinnaður.

**Sjálfstæðisflokkurinn**: Flokkurin liggur á mið- høgraveinginum, og er ein av teimum elstu flokkunum, stovnaður í 1929. Hann er liberal konservativur, fíggjarliga liberalur og ímóti ES limaskapi. Savnar vanliga veljarar frá øllum høgra veinginum.

**Framsóknarflokkurinn:** Flokkurin liggur á miðjuni móti høgru, varð stovnaður í 1916 og var og er ein partur av bónda og fiskimanna rørsluni. Vanliga væl dámdur úti á bygd og uttanfyri Reykjavik. Er ES ivandi.

---

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook